## Jólakonsert við Tórshavnar Kamarkóri

Sunnudagin 9.desember kl. 17 hevur Tórshavnar Kamarkór undir leiðslu av Kára Bæk sína árligu jólakonsert sum í ár verður í nýggju stásiligu Hoyvíkar Kirkju. Skráin er sera fjølbroytt. Millum annað framførir kórið Magnificat í B-dur eftir Francesco Durante. Til hetta verkið hevur kórið fingið fimm strúkarar frá Tórshavnar Musikkskúla umframt at fýra sangsolistar eru við til framførsluna. Nýggja verkið "Himin boðar hátign Guðs" ið Kári Bæk komponeraði til vígsluna av Hoyvíkar Kirkju verður eisini framført á hesi jólakonsertini. Til hetta verk eru eisini tveir floytusolistar og ein bariton solistur. Til eina jólakonsert hoyra eisini meira siðbundnir jólasangir, og til teirra, sum vilja hoyra hesar, er eisini okkurt, tí fleiri tílíkir eru eisini á skránni. Afturat Tórshavnar Kamarkóri framføra musikkskúlanæmingar eisini nøkur verk á hesi jólakonsertini.

## Hugnalig jól í Vágum

Tey, ið hava hug at ogna sær ein góðan hondvirkaðan lut, og ein góðan drekkamunnu fáa eitt gott høvi til hetta í Pakkhúsinum Bø. Henda sølan ehvurverið opin og verður opin leygardagin aftrat. leygardagin., sum hevur opið til og við leygardagin 08.12, har nógv hondvirkað verður selt og ein góður drekkamunnur er at fáa. Eisini sørvingar gera burtur úr nú undan jólum. Har eru eini hugnalig jólahús, sum hevur opið sunnudagarnar fram til jóla.

# Fyrsta løgtingsval í januar síðani 1940

**Fyri tey flestu man 8. november merkja valdagur. Men síðani meira órgógv kom í tingarbeiðið – fyrstu ferð í nýggjari tíð í 1980, hava vit havt fýra løgtingsval í ótíð. Seinasta løgtingsval og tað komandi valið eru tey fyrrstu januarvalini síðani 1940. Men í 1932 var eisini løgtingsval 19. januar**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Tinghúsið sum tað sá út um næstsíðsta aldamótið. Fyrsta løgtingsvalið eftir floksbýtið á tingi var í 1906. Síðani tá hava verið 32 løgtingsval. Árini frá 1906-16 var løgtingsval annaðhvørt ár, har ávikavist fólk í sunnaru helvt og norðraru helvt valdi aðruhvørja ferð. 15 løgtinsval hava verið hildin í november, 10 teirra hava verið tann 8. november*

Síðan vit fingu politiska floksbýtið á løgtingsvalinum í 1906, hava vit havt 15 november-val, har av tey 10 hava verið 8. november. Januarval vóru vanlig frá 1924 til 1940.

Tey fyrstu árini var løgtingsval annað hvørt ár, har so helmingurin av tinginum varð valt í senn. Tey valini vóru oftast í februarmánaði. Men hesum varð farið frá í 1918, tá valt var um alt landið í senn, og soleiðis hevur verið síðani.

Síðani 1980 hava vit hava fýra løgtingsval í ótíð. Í 1980 slitnaði samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin um uttanlandssiglingina hjá Strandferðsluni.

Í 1990 slitnaði samgongan millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin um eina eykajáttan upp á nakrar milliónir til Landsverksfrøðingin.

Í 1994 slitnaði samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Í 2002 slitnaði samgongan millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin, eftir at Tjóðveldisflokkurin hevði lagt misálit fram móti Anfinni Kallsberg, løgmanni.

Vit skulu 76 ár aftur í tíðina fyri at finna eitt løgtingsval, sum varð hildið 19. januar. Tað var í 1932. Við hetta valið fekk Sjálvstýrisflokurin átta tingmenn, Sambandsflokkurin 11 og Javnaðarflokkurin tveir. Broytingin var, at Sjálvstýrisflokkurin misti tríggjar, Sambandsflokkurin misti ein og Javnaðarflokkurin varðveitt sínar tveir tingmenn. Talið av eykamandatum, sum kundi verða upp til 10 gjørdi, at ofta stórur munur var á, hvussu nógvir tingmenn mannaðu tingið.

Leita vit á netinum upp á hendan dagin, so kann til stuttleika leggjast afturat, at hendan 19. januar í 1932 kom Herbert Hoover, forseti í USA, fram við uppskotinum um fimm daga arbeiðsviku...

Løgtingsvalini seinastu 102 árini hava verið hildin hesar dagar:

| | |
|---|---|
| 2008: | 19. januar |
| 2004: | 20. januar |
| 2002: | 30. apríl |
| 1998: | 30. apríl |
| 1994: | 7. juli |
| 1990: | 17. november |
| 1988: | 8. november |
| 1984: | 8. november |
| 1980: | 8. november |
| 1978: | 8. november |
| 1974: | 7. november |
| 1970: | 7. november |
| 1966: | 8. november |
| 1962: | 8. november |
| 1958: | 8. november |
| 1954: | 8. november |
| 1950: | 8. november |
| 1946: | 8. november |
| 1945: | 6. november |
| 1943: | 28. august |
| 1940: | 30. januar |
| 1936: | 28. januar |
| 1932: | 19. januar |
| 1928: | 23. januar |
| 1924: | 22. januar |
| 1920: | 10. november |
| 1918: | 24. apríl (fyrstu ferð valt um alt landið) |
| 1916: | 28. februar (sunari helmingur) |
| 1914: | 2. februar (norðrari helmingur) |
| 1912: | 2. februar (sunnari helmingur) |
| 1910: | 12. februar (norðrari helmingur) |
| 1908: | 2. februar (sunnari helmingur) |
| 1906: | 18. juli |

# Løgmaður fekk boðini í Waterloo

**Tað var meðan løgmaður gekk og spákaði sær í navnframa býnum Waterloo 10 km sunnan fyri ES-høvuðsstaðin, Brúsell, at hann fekk boðini um stríðið í samgonguni**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var við býin Waterloo, at Napoleon Bonaparte, seinasti franski keisarin, fall tann 18. juni 1815 og varð fluttur á fangaoynna St. Helena, har hann var restina av ævi síni.

Tað var kanska ikki júst hesa samanberingina, løgmaður meinti við, men tað var meðan hann gekk í Waterloo, at Kaj Leo Johannesen ringdi til hansara og segði, at álvarsamir trupulleikar vóru í samgonguni, tí at John Johannessen hevði lagt uppskot fram á ting um nýggja studentaskúla í Hoydølum.

Á tingsins røðarapalli hugleiddi løgmaður í gjárkvøldið um orsøkina til, at Sambandsflokkurin tók stuðulin til samgonguna aftur. Hann helt ikki, at orsøkin kundi vera uppskotið hjá Johan Johannessen, tað var tikið aftur.

- Allar hesar søgurnar um øll málini, sum liggja í tinginum, er ein mýta. Tey eru øll innroknað í fíggjarlógina – uttan tvey, sum ikki vera realiserað, segði løgmaður.

Hann segði, at hann hevði hugt Kaj Leo Johannesen í eyguni á síðsta samgongufundi og avtalað við hann, at samgongan skuldi gjøgnumføra øll hesi málini.

- So trúði eg, at tað var málið um at stytta freistina at útskriva val, sum var orsøkin. Men tað kann tað heldur ikki vera, um man hyggur eftir álitinum frá rættarnevndini og lesur tað, sum formaðurin, Marjus Dam hevur skrivað, segði løgmaður, og so skrivaði hann út val at vera 19. januar 2008.

# Nýggj bók: Hvalurin er mín

BÓKAÚTGÁVA

Forlagið Ritstarv hevur givið út siðsøguligu bókina "Hvalurin er mín", sum Helgi Jacobsen hevur skrivað.

HVALURIN ER MÍN er ein søgulig lýsing av stórhvalasøguni í Føroyum. Bókin er somuleiðis ein lýsing av sjálvari veiðuni á hvalabátunum og arbeiðinum á hvalastøðunum. Talan er um ein nærum gloymdan tátt í okkara vinnulívssøgu, sum byrjaði í 1894, og sum var í hæddini frá 1898 til 1911.

Tað vóru norðmenn, sum byrjaðu stórhvalaveiðuna í Føroyum, men onkustaðni var helmingurin av partapeninginum føroyskur. Bókin lýsir væl ta ídnaðarmenning, sum kom til Føroya við guvuskipum, kanónum og sjey framkomnum hvalastøðum á landi og onkuntíð 17 hvalabátum samstundis.

Seinni yvirtóku føroyingar hvalastøðirnar í Lopra og við Áir.

Hvalaveiðan útvegaði frá byrjan nógv arbeiðspláss og rindaði eitt skiftið meira pengar til almennu amtskassarnar og vegagerð, enn nøkur onnur einstøk vinna. Nýggj tíð var komin til landið. Arbeiðsmenn fingu pengarnar í hondina, og menningin av áður ognarleysum fólkum fekk eitt nýtt bein at standa á.

Stórhvalavinnan hevði samstundis sera stóran týdning fyri føroyska húsarhaldið við bíligum hvalatvøsti sum munadygt føðsluískoyti.

**Fakta:**
Hvalurin er mín
Høvundur: Helgi Jacobsen
310 síður og 230 myndir
kr 320

